# Allur peningurin fyri einskiljingar fór í "stórapott"



**- Tað tykist løgið og sjálvmótsigandi, at partar av samgonguni, sum nú hevur sitið í 5 ár við breiðum meiriluta, einki annað svar hevur til vánaligu búskaparligu støðuna enn at skjóta skyldina yvir á blokkniðurskurðin, sum varð framdur í 2002, segði Kári P. Højgaard á landsfundi Sjálvsstýrisfloksins. Hann helt, at allir flokkar eiga medábyrgd av støðuni, sum samfelagið er í**



*- Allur peningurin við einskiljingini av Føroya Banka og Atlantsflogi er farin í stórapott ella í veruleikanum rakstur. Hetta hendi, tó at avtala var millum politisku flokkarnar, at hesin peningur skuldi setast í búskapargrunn, segði floksformaðurin, Kári P. Højgaard á landsfundi floksins*

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sjálvsstýrisflokkurin helt landsfund í Vestmanna leygardagin. Fundurin varð hildin á Fiskivinnuskúlanum og millum framløgurnar, var røðan hjá floksformanninum, Kára P. Højgaard.

Kári byrjaði við at siga, at sjáldan man politikkur – ella vantandi stýring, sum hann málbar seg – hava fylt bløðini og hava myndað tíðindaflutningin í loftmiðlunum, soleiðis sum talan hevur verið um hetta seinasta árið.

- Hetta hevur ikki mint sørt um wrestling, ið er ein samansjóðing av undirhaldi og ítrótti, ið ikki er nøkur verulig kapping. Teir, sum hava skrivað og hava lagt til rættis, avgera sjálvir, hvussu leikur skal enda.

### Veksandi útreiðslur

Floksformaðurin segði, at Sjálvstýrisflokkurin misti róðurtørnið á Føroya skútu fyri skjótt seks árum síðani.

- Sambært frágreiðing til fíggjarlógaruppskotið fyri 2010, vóru inntøkur landskassans í 2004 slakar 3,5 miljardir krónur, meðan roknað verður við 3,9 miljardum krónum í 2010. Hetta er ein vøkstur í inntøkum áljóðandi 400 miljónir krónur. Útreiðslur landskassans er sama tíðarskeið vaksnar úr 3,6 upp í 4,7 miljardir krónur, sum er ein góð miljard í vøkstri. Roknað verður við, at landskassin fer at hava eitt hall í 2010 áljóðandi einar 800 miljónir krónur.

Kári vísti á, at búskaparráðið í síni nýggju frágreiðing sigur, at stóra politiska avbóðingin í løtuni er at fáa fíggjarpolitikkin aftur á beint alt fyri eitt. Javnvág má fáast millum minkandi inntøkurnar og veksandi útreiðslurnar.

- Heldur hetta fram, og kemur fíggjarpolitikkurin ikki aftur á beint nú, kann gerast tungt at fáa almenna hallið burtur, segði floksformaðurin, tá hann vísti til hesar metingar hjá búskaparráðnum.

### Blokkur skyldina

Kári P. Højgaard segði í síni framløgu, at fleiri ferðir hevur verið ført fram, at niðurskurðurin av blokkinum hevur alla skyldina. Hann segði, at sjálvsagt hevur niðurskurðurin havt sína ávirkan, men tá ABC-samgongan skrivaði samgonguskjalið í 2008, varð sagt um ríkisveitingina – og her endurgav hann fylgjandi:

"Ásannandi, at tað er umráðandi fyri samfelag okkara at vaksa seg til ein sjálvberandi búskap, er semja millum flokkarnar um, at ríkisveitingin verður lækkað við 15 prosentum av reella inntøkuvøkstrinum av skattum og avgjøldum hjá landskassanum við støði í meðal vøkstrinum seinastu 5 árini. Skipanin kemur í gildi í sambandi við fíggjarlógina fyri 2010.."

Hann helt, at tað tí kann tykjast løgið og sjálvmótsigandi, at partar av samgonguni, sum nú hevur sitið í 5 ár við breiðum meiriluta, einki annað svar hava til vánaligu búskaparligu støðuna enn at skjóta skyldina yvir á blokkniðurskurðin, sum varð framdur í 2002.

- Samgongan er jú samd um at halda somu kós móti einum sjálvberandi búskapi við at lækka ríkisveitingina eftir einum ávísum myndli. Tað krevur politiskt dirvi at fremja raðfestingar, hvat skal gerast, og hvat skal veljast frá.

### Allir medábyrgd

Kári P. Højgaard helt ikki, at politiska skipanin hevur megnað at tillagað samfelagið til niðurskurðin í

# Samsvar skal vera millum orð og gerðir

**- Tað er týdningarmikið í øllum viðurskiftum, at orð og gerðir fylgjast. Sannleikin er, at Jóannes Eidesgaard, tásitandi løgmaður, setti tunnilsgerð í hesum valskeiði fram sum krav mótvegis Sjálvstýrisflokkinum. Hetta kostaði okkum samgongumøguleikan, segði Kári P. Højgaard á landsfundinum**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í einum parti av røðu síni, vísti floksformaðurin á tað, sum stendur í verandi samgonguskjali um Sandoyartunnil – og hann endurgav fylgjandi:

" Arbeitt verður víðari við verkætlanini at gera fast samband um Skopunarfjørð, herundir við at finna fíggingarleist. Tá liðugt er at gjalda til Norðoyatunnilin næsta ár, verður samsvarandi árlig upphædd flutt til Sandoyartunnilin, og farið verður í gongd í 2011.."

- Eg vil minna á, at tað var bert Sjálvstýrisflokkurin til seinasta løgtingsval, sum greitt boðaði frá, at íløgur í undirstøðukervið ikki fingu hægstu raðfesting hetta samgonguskeiðið. Allir hinir flokkarnir lovaðu hinvegin, at Sandoyartunnilin skuldi í gongd sum skjótast.

Formaður Sjálvstýrisfloksins vísti á, hvussu týdningarmikið tað er í øllum viðurskiftum, at orð og gerðir fylgjast, sum hann tók til.

- Sannleikin er, og kann prógvast við vitnum, at Jóannes Eidesgaard, tásitandi løgmaður, setti tunnilsgerð í hesum valskeiði fram sum krav mótvegis Sjálvstýrisflokkinum. Hetta kostaði okkum samgongumøguleikan. Nú seinasta veljarakanningin gav Javnaðarflokkinum metlága undirtøku, hevur pípan fingið eitt annað ljóð, tí nú verður fráboðað, at menningarliga virðini eru týdningarmiklari enn vegir og tunnlar. Nú skulu tey bleytu virðini raðfestast fyrst.

Kári P. Højgaard helt fyri, at síðan valið í 2008 hevur politiska arbeiðið stórt sæð gingið í tómgongd.

- Tað skapar órógv í politisku skipanini, eins og tað ger tað í fólkinum, tá kenslan er, at fólkið á brúnni als ikki hevur tamarhald á føroysku skútuni.